FØROYA SOSIAL DEMOKRATUR

kemur út eina ferð um vikuna og kostar **kr. 2,00** + porto um fjórðingsárið.

Bráðf. blaðstjóri: *MARTIN JOENSEN*

Prent: *A. ØSTER's*

Heimatíðindi

Róin«, báturin hjá A. T. úr Svøriki, kom aftur undan Islandi, har hann hevði roynt við troli. Hann hevði fingið u. 400 kurvir. Spælið var brotnað hjá honum. Trolgreiðirnar høvdu roynst væl, og høvdu teir trolað á 140 favna dýpi, men spælið var ovveikt til greiðirnar, og tilfarið í ti vánaligt. Hesin báturin sýnist ikki at vera væl úr hondum greiddur, og tilfarið er vánaligt. Hann var so illa kalfatraður, at hann mátti uppá beding. Skrúubløð brotnaðu, og nú aftur spælið. Hann skuldi so at royna við snurriváð í Norðsjónum.

Annars sýnist mangt tilfar, ið nýtt verður bæði nú og undir krignum at vera ógvuliga ringt. Stálið í spælinum hjá »Brimnes« er so bleytt, at tað kleimist, tá ið tað skal nýtast. Soleiðis er oftast, tá ið kriggstiðir eru, og ein eigur at vera varin og ansa væl eftir, tá ið hann fer at keypa nakað, ið gjørt er í slíkum tíðum.

»Maritè« ætlar at fara til Grønlands til saltfiskaveiðu. Ymist er sum sagt verður um saltfiskaprísin. Summir láta illa, og summir heldur betur at honum.

Motorbáturin »Heimdal« av Tvøroyri hevði fingið óføra kalvaveiðu her eystanfyri Suðuroynna, 4300 pund tvær royndir. Aðrastaðni høvdu menn havt hug at roynt við kalvalínu, men sera trupult er hjá bygdunum at fáa síld, og ringt er har, sum eingi frystihús eru at goyma agn. Her er stórspurningur at loysa, um bygdirnar skulu fáast við at rógva út.

Elektricitetið er vánaligt á Suðuroynni. Boðað er frá, at bara mitt um dagin kann tað nýtast, (ljós plagdi annars mest at vera nýtt í myrkri, og tá er tað sera hent, sum maðurin segði) avbrotið er longu kl. 6 á kvøldi. Hetta verkið tykist ikki at fara og vera brúkiligt í framtíðini. Vit sum skulu ætla okkum at nýta elektricitet til frystihús, ídnað og hvørt av sínum, kunnu ikki hjálpast við eitt verk, ið ikki kann geva ljós frá sær. Her er aftur ein stórspurningur, ikki bara hjá bygdum sum Tvøroyri og Vág, men um allar Føroyar at fara í holt við.

»Varðin«, bind XXIV, hefti 3—4 er komin. Ein umrøða ætlast at koma seinri.

Blanka er besta blankingarevni.

SEYÐURIN

LEMBINGIN

Lembingin er av, lambstalið er um meðal. Veðrið var gott í lembingatíðini, so tað varð at vænta, at nógv varð at skera í heyst. Men har lembingin byrjaði fyrst í apríl, sigst at vera vánaligt í stöðum. Veturin tók seyðinum fast og várið varð av tein kaldastu, ja, so kalt og turt, at seyður valla fann gróna nál, fyrr enn komið var væl út um hálvan mai. Hetta hevði tað til úrslit, at har tað lembdi tíðliga, mjólkaði mong ærin av sær, tað hon hevði eftir av holdum, so tað var ikki so lítið, sum doyði, bæði av lombum og óm. (Síðan 1927 er ofta ávíst í blöðunum og við tölum prógvað at tann seina lembingin er árvísari). Men um nakrir hagar gera útvegir fyri tí, og grannin ikki, er lítil bót hjá tí, „ið böta vil sítt fæ".

Men tá nú 2/3 av Föroya seyðamonnum eru fyriat hava seina lembing og krevja tað lógfest, er væl cinki at ivast í at tingið samtykkir lóg, ið kann fyribyrgja at lembingin byrjar ov tíðliga, við tað at brundarnir verða hildnir inni.

Av tí, tað so ofta er ávíst, hví tann seinna lembingin er betur, skal hesi ferð bert vísast á hetta:

„Tá fostrið er 4 mánaðar (120 dagar) gamalt, er tað 14—15 cm á longd, og 5 mánaðar 40—45 cm langt. Soleiðis veksur fostrið síðsta mánaðan *triggjar ferðir* tað, tað vaks í *fyrstu* mánaðirnar."

Allir menn vita, at um ærin lembir 5. mei, ístaðin fyri 5. apríl, so er tá so langt útliðið, at hon föðir, um hon ikki mjólkar so nógv teir fyrstu dagarnar, bert mjólkin er vaksandi. Og ikki sum í ár, har tað lembdi fyrst í apríl og ærnar fóru upp í stein. Tann, ið hugdi eftir, sá hvussu hesi lomb sóu út uppá fót í vár: Herðablöðini upp um háryggin, sligin í hálsinum (sum skrinda), høvdið stórt og groft, ullin rísin og glansaleys.

Í ár var bæði turt og kalt fyrst í mai, so turt, at illa gekkst hjá ærini at finna vatn á grunnum haga. Tað er hent at gera brunn við kelduspring, so vatnið ikki fer aftur í jørðina. — Í lembing, tá allur seyður liggur í lághaga, fellur tað lett at geva honum kraftfóður í húsunum; ella at gera mjólkrubbur til hann á haga, har annars eingi hús eru (sjá Dagbl. nr. 12 1943). Seyðamaðurin gevur so kraftfóður eina ella tvær reisur um dagin til líkinda gróður er komin. Tá er seyðamannsgongdin í lembing ikki nyttuleys (sí J. Patursson: Seyðarøkt í Föroyum), um tað so er á víðgongdum haga.

Tað er at gleðast yvir, at fleiri hava tikið eftir hesum, og ein av undangongumonnunum var Jóhan í Horni, fyrrv. bóndi á Flötum í Havn. Allir, ið til kendu, vita, hvat Jóhan heystaði fyri tann stuðul, hann gav seyðinum í lembing, og annars tá á stóð.

Hólmarð má verða við, at 1000 seyð-ir doyðu í raki í vár um Föroyar. Um hesir 1000 seyðir høvdu fingið 100 kg. sildamjøl dagliga í 3—4 víkur, til tað var gróður komin, so var seyðurin ivaleyst á lívi.

1000 áseyðir a 90 kr.....	kr. 90.000
100seyðir eta í 24 dagar 2½ tons sildamjøl.....	2.000
Munur..	kr.88.000


S. Patursson.
seyðaráðgevari.

Træhegnpelar (Props)


kunnu nú fáast til keyps við at venda sær til Peter Bærentsen, Tvøroyri. Prísurin er á Drelnesi: 30 oyru pr. fót 3", 50 oyru pr. fót 4—5" og 70 oyru pr. fót 6—8" kontánt galdan.

Løgtingsskrivstovan.

HESS BYGNINGS-STØBEGODS



Alt, hvad der skal bruges af Bygningsstøbegods fra Kælder til Kvist, kan faas fra C. M. Hess i Vejle. - Alle Modeller er hensigtsmæssigt udformet og gennemprøvet i Praksis, og Kvalitet og Udførelse er første Klasses ...



Valdemar Lützen, Tlf. 16.

Lýsing

Nýggj útfluttningsloyvir eru nú send út til allar reiðarar, ið hava sent inn upplýsingar um teirra skip, sum sigla við ísfiski.

Um nakar ikki hevur fingið slíkt loyvi til skipið, má hann sum skjótast venda sær til útfluttningsnevndina við neyðturviligum upplýsingum.

Tað er umráðandi at hvør reiðari beinan vegin fær flýggjað tey útsendu loyvini umborð í skipini, tí nú sigst bretska valdið at krevja útfluttningsloyvini fyrivist, tá skipið skal landa ísfisk.

Samstundis verður aftur mint á at leygardagin 8. Juni — victory day — eru allir bretskir fiskamarknaðir stongdir, og væntast heilt ring landingarlíkindi um hvitusunnuna frá 6. til 11. juni.

Tórshavn, 25. mai 1946.

ÚTFLUTTNINGSNEVNDIN

Aðalfundur

verður í P/f »Samgongd«, Tvøroyri, tann 20. juni 1946 kl. 8 s. p. á A. T.s skrivstovu.

Stjórnin.

Føroya Sjóvátrygging

Skip - motorbátar útróðrarbátar - vørur verða tryggjað

Telf. 372

Lastvognskoyring

Anton Arge (y) Húsabrúgv

Tlf. 443

ØLL *eiga at brúka* Føroyska hondsápu frá fabrik OKKARA

Mandlige og kvindelige Plejeelever

i Alderen 20—28 Aar kan antages. Løn i Elevaaret Kr. 100,—, 105,—. Skema til Ansøgning kan rekvireres paa Hospitalet.

Sindsygehospitalet i Nykøbing Sj.

FØROYA BRUNATRYGGING

Hús - innbúgv - vørur - verða tryggjað.

Skrivstovan er opin frá kl. 10-1 og 3-5.

Leygardag - - 10-2.

Telf. 372.

Næmingar.

Nakrir dreingir kunnu fáa pláss sum næmingar á Royndarbrúkinum í Hoyvík.

J. Huusgaard.

Tit fáa **bestu málingina hjá okkum.**

M. P. Jacobsens máarabúð.

det mest økonomiske

„HESS INDMURINGS KOMFURET"



Valdemar Lützen, tlf. 16.

Lýsið í Sosialinum.